## Bárður aftur í HB

HB skrivar á heimasíðu sínari, at felagið nú aftur hevur Bárð Mortansson í spælarahópinum. Bárður lesur í løtuni løgfrøði í Bretlandi, men hetta til kappingarlok verður hann staddur í Føroyum. Sæð burtur frá árunum 2001-2004, so hevur Bárður altíð spælt fótbólt í HB, og tí er ikki annað enn náttúrligt, at hann eisini nú verður partur av hópinum, skrivar heimasíðan.

**-mørk**



*mynd: www.hb.fo*

## Fimm eru javnir

Helgi Dam Ziska hevur veruliga tikið dik á seg í Suðuroy International, sum verður telvd í hesum døgum. Hósdagin snávaði Hans Kristian Simonsen óvæntað móti Per Andreasen, sum annars var aftastur, og tí kundi Helgi við sínum triða sigri á rað leggja seg heilt fram í oddin. Fimm telvarar eru nú javnir í oddinum við 4,5 stigum hvør. Hesir eru Helgi Dam Ziska, Hans Kristian Simonsen, John Arni Nilssen, Bjørn Brink-Claussen og John Rødgaard.

**-mørk**

## Kann KÍ halda Kósini?

**Eftir fína avrikið hóskvøldið tykjast klaksvíkingar aftur hava fingið ferð á. Ein sigur sunnudagin kann føra teir heilt nær oddinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trivaligi sigurin í Gøtu bar við sær, at KÍ kreyp upp á fimta plássið á stigatalvuni. Hóast teir í verandi støðu hava spælt ein dyst fleiri enn flestu kappingarneytarnir, so tað – sum maðurin segði – ivaleyst betri at hava spælt og vunnið dystin. Hartil kemur eisini, hesin dysturin fyri tað nógva bygdi víðari á góðu taktirnar, sum KÍ sýndi fyrra umfarið í heimadystinum móti HB, og tí er einki at ivast í, at teir bláu enn einaferð fara eftir øllum stigunum. Megna teir at loysa tann setningin, so fer tað skjótt aftur at síggja heilt ljósablátt út hjá felagnum, sum enn hevur setningin um 2009 hangandi yvir sær.
Hjá Tony Paris er tað hugalig staðfestin, at talan ikki er um leikbann av nøkrum slag. Sinisa Jovevic og Paul Clapson fóru tó smáskaddir av vølli hóskvøldið, men talan var tó neyvan um álvarsligar skaðar.

Hjá NSÍ eru allir mans fit-for-fight. Einasta fráveran er Pól Thorsteinsson, sum í hesum døgum er í Týsklandi og hyggur at HM-fótbólti, og tí er neyðug at seta nýggjan mann í miðverjuna.

# Havnarliðini dystast um gulli

**Tey fýra seinastu árini er FM-gullið endað í høvuðsstaðnum. Hvussu væl HB ella B36 skulu verða við í gullstríðnum í ár, veldst nógv um úrslitið sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast slagið um høvuðsstaðin altíð er nakað serligt, so tykist støðan vera eyka spent í løtuni. Hóast kappingin enn bara er hálvrunnin, so er oddurin framvegis mest sum púrasta javnur, og tí telur hvørt tað einasta fetið – bæði rætta og skeiva vegin.

Tendensurin millum oddaliðini hevur í ár verið hópur av javnleikum, og tí er týdningarmesti setningurin kanska, at dysturin ikki verður tapur. Hinvegin, so merkja mongu javnleikirnir eisini, at vinningurin við sigrum er sera stórur, og tí kann ein møguligur vinnari hesa ferð gera eitt ordans skarvslop, meðan taparin fyri eina tíð verður settir eftir.

Hjá B36 er talan um sama hóp, sum fyri viku síðani vann 4-1 á ÍF. Enn resta Fróði Benjaminsen og Ingi Højsted afturat, men hóast Fróði er byrjaður at venja aftur, so er enn ikki hugsingur um, at hann fær spælt dyst.

Hjá HB er talan mest sum um sama hóp, sum fekk javnleik í Klaksvík fyri 10 døgum síðani. Undantakið er liðskiparin, Janus M. Joensen, sum fekk reytt kort í Klaksvík.



*Talan er enn einaferð um eina grannauppgerð, har tað eisini stendur meira enn »bara« æran upp á spæl*

# Botnbrak á varmakeldu

**Umframt steypið á stevnudystinum er vinningurin leygardagin eisini eitt lítið fríplás í botnstríðnum í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við átta stigum hvør eru ÍF og VB/Sumba botnproppararnir í Formula-deildini. Tí er talan um ein veruligan botngysara leygardagin – ein sonevndan seks-stiga dyst.

Fuglfirðingar, sum taptu greitt í Havn fyri viku síðani, hava annars havt stóra framgongd nógvu tey seinastu umførini, og ivaleyst er tað hendan framgongdin, sum teir ætla sær at byggja víðari á leygardagin. Í mun til dystin í Havn er hópurin eisini styrktur, tí bæði Bartal Eliasen, sum var leikbannaður, og Eyðun Rygshamar, sum var skaddur, eru nú aftur partur av hópinum.

VB/Sumba hevur tó eisini styrkt sær um hópin. Umframt Tummas Paula Olsen úr B71 eru tveir serbar komnir til landið, og teir eru við í hópinum leygardagin. Hinvegin dregur tað niður, at Dan Djurhuus og Suni úr Hørg báðir eru leikbannaðir eftir rokið, sum var móti dystarenda á jóansøku.



*VB/Sumba fekk síni fyrstu stig á árinum, tá teir í sætta umfarinum vunnu 2-1 í Fuglafirði*